tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard

Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
Yngd: Jákup Mørk

Myndamenn: Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegur 26, Argir

Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820
Telefax. 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: Sosialurin

Spennandi tíð fyri framman

Oddagrein

TANN 17. mai fer uttan iva at gerast ein minniligur dagur í føroyskari vinnusøgu. Henda dagin gongur freistin út hjá oljufeløgum at søkja um loyvi at leita eftir olju og gassi á landgrunninum. Tá 1. útbjóðingin varð latin upp 17. februar boðaði landsstýrismaðurin í oljumálum frá, at umsóknir til 1. útbjóðingina skulu vera inni um tríggjar mánaðir. Soleiðis sum tað ljóðar, tykist áhugin hjá feløgunum fyri at vera við í útbjóðingini at vera stórur. Treytirnar, sum tingið hevur álagt oljufeløgunum at lúka fyri at sleppa at bora á landgrunninum, hava eftir øllum at døma ikki vera ræðandi fyri feløgini. Men enn er tó ov tíðliga at siga nakað, um hvussu stórur áhugin verður. Vit vita tó, at okkara oljumyndugleikar fegnir síggja so nógv feløg sum gjørligt. Herfyri segði løgmaður seg eisini vóna, at mong oljufeløg fóru at søkja. Tí tess fleiri søkja, tess størri verður kappingin, og harvið skuldi tað so eisini verið betri møguleiki fyri at fingið eina rímuliga góða og gjøgnumførda leiting, sum so aftur kann hava við sær, at olja ella gass verður funnið.

MILLUM mongu feløgini verða eisini tvey føroysk oljufeløg, Føroya Kolventi og Atlants Kolvetni. Í gjár frættu vit so, at Føroya Kolvetni hevur brotið upp armar og hevur víðkað sítt samtarv til eisini at fevna um norskar oljuveteranar. Tríggir av fremstu serfrøðingunum hjá Saga Petroleum við stórum innliti í nettupp Føroyaøkið, hava gjørt eina alliansu við Føroya Kolvetni. Frammanundan hevur felagið allierað seg við bretska Dana. Ætlanin er at fara inn í 1. útbjóðing sum veruligt oljufelag og taka á seg ein rímuliga stóran vága og harvið eisini skapa umstøður fyri einum avkasti, sum verður hareftir. Hitt føroyska oljufelagið er bygt upp eftir einum øðrum leisti. Meðan Føroya Kolvetni bæði loyvir føroyskum og útlendskum íleggjarum, so skulu partaeigarar í Atlants Kolvetni verða føroyingar. Eisini hevur hetta felagið eina aðra støðu til vága og avkast. Vit skulu ikki her siga, hvør formurin er tann rætti ella betri, bert siga, at tað er gott, at vit hava fingið tvey føroysk oljufeløg, sum vilja vera við í komandi útviklinginum. At vit ikki fingu eitt alment oljufelag á hesum sinni skal eisini liggja her. Men rætt er at taka spurningin aftur til umrøðu, tá vit hava lært av royndunum frá 1. útbjóðing og vit møguliga hava fingið prógv um, at okkara undirgrund goymir stórar nøgdir av olju. Vit ynskja teimum báðum privatu føroysku oljufeløgunum góða eydnu í royndunum at koma sær uppí eina komandi oljuvinnu.

Sosialurin

Samferðslan órógvað

Neyðugt var at steingja ávís vegastrekki av illveðrinum í gjár. Eisini varð samferðslan á sjógnum órógva

JOHN JOHANNESSEN

Ringa veðrið gjørdi, at Smyril varð seinkaður á ferðini úr Suðuroy og norður til Havnar fyrrapartin í gjár

Í gjár var rættuligt illveður kring landið. Nógvur vindur var av landssynningi og eystri. Eisini kavaði illa nógvastaðni og jarðrok var á flestu vegastrekkjunum millum bygda.

Hetta hevði við sær, at samferðslan gjørdist heldur óreglulig. Neyðugt varð at steingja vegin til Vestmanna, tí har reyk so illa, og ringt var hjá kavaruddarunum hjá Landsverkfrøðinginum at halda vegin reinan fyri kava.

Fleiri bilar fastir

Fyrrapartin í gjár stóðu fleiri bilar, sum vóru farnir avstað áðrenn vegurin varð stongdur, fastir á vegastrekkinum til Vestmanna. Men maskinurnar hjá Landsverkfrøðinginum vóru skjótar at koma fólkunum til hjálpar, so av hesum stóðst eingin vandi.

Ikki var koyrandi til Gjáar og Oyndarfjarðar meginpartin av degnum í Gjár. Har bar illa til at grava, tí tað reyk so illa.

Leiðirnar 400, 100 og 703 við síðuleiðum vórðu avlýstar tíðliga gjáramorgunin, og tá Sosialurin tosaði við SL á middegi í gjár var ikki vist, nær leiðirnar fóru aftur at koyra.

Smyril seinkaður

Smyril hevði ein heldur drúgvan túr úr Suðuroynni gjáramorgunin. Hann skuldi fara av Drelnesi klokkan sjey, men av tí, at bíðað var eftir, at Hoyvíkingur kom inn á Tvøroyri við sjey monnum, ið skuldu til Havnar, fór hann ikki avstað fyrr enn tjúgu minuttir seinni.

Orsakað av ringa sjógvinum og mótrákinum var neyðugt hjá Smyrli at fara vestur um Sandoynna. Tískil gjørdist túrurin heldur drúgvur, og var skipið ikki á Havnini fyrr enn klokkan hálvgum ellivu, hálvananannan tíma seinkaður.

Hóast ringa veðrið í gjár, helt Smyril fram at siga eftir vanligu ferðaætlanini.

Flogferðslan reglulig

Hóast ringa veðrið var flogferðslan so at siga reglulig allan dagin. Maersk flogfarið lendi sum væntað klokkan ellivu fyrrapartin og fór av stað aftur til vanliga tíð.

Flogfarið hjá Atlantsflog valdi at útseta fráferð sína úr Vágum til øll tey mongu ferðafólkini, sum stóðu føst á veg til Vestmannar, vóru komin á flogvøllin.

Tá vit tosaðu við kunningardiskin á flogvøllinum í gjár, var nógvur vindur og rok. Men ætin til at fara á flog og til at lenda var góð. Heldur ikki bilti at halda flogvøllin reinan.

Danskt neytakjøt av føroysku hillunum

Eftir at neytaøði er funnin í donskum neytakjøti, hevur Heilsufrøðiliga Starvsstovan givið forboð móti at selja danskt neytakjøt í Føroym

JOHN JOHANNESSEN

Loyvt er nú ikki at selja danskt neytakjøt í Føroyum. Hesi boð sendi Heilsufrøðiliga Starvsstovan út, eftir at hon hevði fingið boð frá danska Føðevaredirektoratet um, at tilburðir av neytaøði vóru funnir í Danmark og, at Føðevaredirektoratet hevði givið boð um, at danskt neytakjøt skuldi takast av hillunum í donsku handlunum.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan boðar í skrivi til føroyskar fjølmiðlar frá, at hon við heimild í løgtingslóg um matvørur hevur sett forboð fyri sølu av T-bone steak, oksaháryggi, entrecote, oksatunnsteik, oksatjúkksteik og oksatjúkktarmi, allar av donskum uppruna.

Fólk, ið eru í iva um vørur, tey hava keypt, kunnu spyrja seg fyri í handlunum og møguliga sleppa at lata vørurnar inn aftur. Heilsølurnar í Danmark hava, sambært Føðevaredirektoratet, skyldu at taka vørurnar inn aftur.

Neytakjøti hjá slaktaranum í SMS er newzealandsk, og tí er eingin vandi við at keypa hetta kjøti. Mynd: Jens Kr.

†

BERGITTA JOENSEN
vaskarífyristøðukvinna, vanliga nevnd Gitta

Klaksvík, ættað av Hellunum, andaðist týsdagin 29. februar á Klaksvíkar sjúkrahúsi, 78 ára gomul.

Farið verður úr kapellinum á Klaksvíkar sjúkrahúsi heim í Christianskirkjuna fríggjadagin hin 3. mars kl. 18.

Jarðarferðin verður úr kirkjuni leygardagin 4. mars kl. 13.00.

Tey, ið vilja minnast Gittu, kunnu geva eina gávu til KFUM & K í Klaksvík, konto í Norðoya Sparikassa.

Fyri tey avvarðandi
Martin og ommubørnini